UTTAN ÚR HEIMI

# Ætlaðu at bumba eitt fullsett Old Trafford

**Sjálvmorðsbumbumenn høvdu keypt atgongumerki til stórdystin á Old Trafford nú leygardagin ímillum Manchester United og Liverpool. Ein atsókn at einum fullsettum Old Trafford við 68.000 áskoðarum kundi kravt fleiri túsund mannalív**

YVIRGANGUR

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*



*Old Trafford tekur 68.000 áskoðarar, og ein sjálvmorðsatsókn har kundi lættliga kravt fleiri túsund mannalív, sigur bretska løgreglan*

*Mynd: Reuters*

Umleið 400 bretskir løgreglumenn rannsakaðu mánadagin fleiri hús í Mið- og Norðuronglandi. Í miðbýnum í Manchester vórðu seks menn og ein kvinna tikin, og í Staffordshire, South Yorkshire og West Midlands tók løgreglan trý fólk afturat.

Tað vísti seg, at tey tiknu høvdu keypt atgongumerki til stórdystin á Old Trafford í Manchester nú leygardagin ímillum Manchester United og Liverpool. Harafturat vísti tað seg, at tey høvdu keypt atgongumerki ymsastaðni kring vøllin.

- Ætlanin var, at sjálvmorðsbumbumenn skuldu spreingja seg í luftina undir dystinum. Hevði tað eydnast teimum at fullføra ætlanina, kundi hon lættliga kravt fleiri túsund mannalív, sigur ein ónevnd løgreglukelda við blaðið The Sun.

Eitt annað blað, The Time, vil vera við, at løgreglan eisini hevur illgruna um, at yvirgangsfólkini ætlaðu at søkja at øðrum málum í Manchester. Blaðið sigur seg hava fingið at vita frá keldum í løgregluni, at umframt Old Trafford var tann stóra handilsmiðstøðin Arndale eitt møguligt álopsmál.

### Ikki óvæntað

Sum skilst hevur bretska løgreglan hildið eygað við teimum tiknu eina tíð. Hon hevur eisini lurtað eftir telefonsamrøðum teirra, og løgreglan gjørdist at enda greið yvir, at alt ruggaði ikki rætt.

Varaløgregluovastin í Manchester, David Whatton, segði við BBC í gjár, at vandin fyri yvirgangi í Bretlandi er størri nú, enn hann hevur verið seinastu fýra mánaðarnar. Fyri fýra vikum síðani fann løgreglan 600 kilo av spreingievni í einum húsum sunnan fyri London. Átta fólk vórðu tikin, og seks teirra sita framvegis í varðhaldi. Tey koma fyri rættin 16. juni.

Sambært teimum bretsku fjølmiðlunum hevði tað borið til hjá yvirgangsmonnunum at sloppið inn á Old Trafford við spreingievninum. Sambært trygdarreglunum verða tey, sum hava atgongumerki í teimum ovastu røðunum, kannað, meðan tey, sum sita longri niðri, kunnu sleppa inn uttan stórvegis kanning.

Avdúkingin hjá løgregluni kemur ikki óvart á bretskar trygdarserfrøðingar.

- Líkt er til, at yvirgangsmenninir ætlaðu at nýta sjálvmorðsbumbumenn hesaferð. Tað er ein drepandi leikur í talvinum ímillum trygdartænastuna og al-Qaeda, sum tykist hava gjørt av at søkja at málum í Bretlandi, sigur trygdarserfrøðingurin Chris Dobson við The Sun. Hann hevur skrivað heilar 20 bøkur um yvirgang og trygd.

# Ivaðist ikki

**Amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, avsannar, at hann hevði hug at halda aftur, tá Bushstjórnin tosaði um at leypa á Irak**

USA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Colin Powell avsannar, at hann hevði hug at draga málið um at leypa á Irak út*

*Mynd: Reuters*

Kendi amerikanski blaðmaðurin og rithøvundurin Bob Woodward skrivar í einari nýggjari bók, at Colin Powell, uttanríkisráðharri, hevði lítlan hug at leypa á Irak, og at hann royndi at draga málið út.

Men tað avsannar Powell.

– Eg ivaðist ikki, og eg royndi ikki at draga málið út. Eg var líka avgjørdur sum hinir í spurninginum um at gera enda á stýrinum hjá Saddam Hussein og tess hópgravum, segði Powell í samrøðu við tíðindastovuna AP í gjár.

Bob Woodwaard gjørdist kendur, tá hann saman við einum starvsfelaga avdúkaði Watergate-gøluna, sum at enda noyddi Richard Nixon, forseta frá. Nú hevur hann skrivað bókina "Plan of Attack" um amerikonsku avgerðina at leypa á Irak.

Í bókini skrivar hann millum annað, at George W. Bush, forseti, tók avgerð um at leypa á Irak longu í januar, og at saudiarabiska sendistovan fekk boðini um avgerðina tann 11. januar. Eisini hetta avsannar Colin Powell. Hann heldur uppá, at avgerðin bleiv ikki tikin fyrr enn í mars, og hann sigur seg ikki vera í iva um, at hann visti líka nógv sum forsetin og hinir ráðharrarnir.

# Indiánar á herferð

Indiánarar í Brasil hava beint fyri 29 monnum, sum komu í øki teirra at leita eftir diamantum.

Brasilska stjórnin hevur sent 300 hermenn til eitt øki á markinum ímillum Brasil og Bolivia, eftir at uppøstir indiánar hava beint fyri 29 monnum, sum vóru komnir hagar at leita eftir diamantum.

Sambært myndugleikunum bendir nógv á, at indiánararnir hava avrættað teir 29 menninar, og at teir hava nýtt boga og ørv, spjót og gassar.

Talsmenn hjá indiánunum siga, at talan var um sjálvverju. Ein av talsmonnunum sigur við eitt blað í Brasil, at indiánararnir ætlaðu at melda teir 29 diamantgravararnar til løgregluna, men at partarnir brustu saman.

Í 1999 komu myndugleikarnir eftir, at nógvir diamantar eru í økinum hjá indiánunum við boliviska markið, og síðani hava fleiri roynt eydnuna har. Umleið 1300 indiánar búgva í hesum partinum av Brasil.



# 200 sangarar í Cristianskirkjuni

**Leygarkvøldið var ein konsert í Christianskirkjuni í Klaksvík við einum kóri við yvir 200 sangarum. Konsertin var eitt úrslit av einari miðvísari venjing allan leygardagin, har fólk, sum hava sungið við KFUM og K kóri síðani 1960, vóru við**

KONSERT

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Góð 200, sum hava sungið við í KFUM og K kóri gjøgnum seinastu 44 árini, luttóku á konsertini í Christianskirkjuni leygarkvøldið*

*Mynd: Bárður Lydersen*

**Klaksvík:**
– Alt eydnaðist væl, og eg haldi ikki, at nakað kiksaði, sigur ein glaður og vælnøgdur Tummas Pauli Mýri, ein av fyrireikarunum av tiltakinum leygardagin.

Hann greiðir frá, at kórið vandi níggju sangir gjøgnum dagin í kirkjuni, og alt endaði við einari stórari konsert, har umleið 4-500 fólk lýddu á. So við kórinum so mundi talið á fólki í kirkjuni leygarkvøldið sníkja seg upp á tey 700, og tað eru fyrireikararnir vælnøgdir við.

Sangirnir, sum vórðu sungnir, vóru blandaðir. Tveir vórðu framførdir acapello og tveir við klaverfylgispæli. Og eisini vóru fimm streingjakórsangir. Fyrst sang kórið fýra, síðani var andakt við Hans Eileri Hammer, presti, og so sang kórið fimm sangir.

Tað var ein vøkur sjón at síggja eitt so stórt kór inni í kirkjuni, og fyrireikararnir høvdu skipað soleiðis fyri, at kórið dekkaði alla breiddina framman fyri altarinum, so at øll sóust líka væl.

Vanliga standa kórini aloftast upp eftir trappunum til sjálvt altarið, men við yvir 200 sangarum, bar tað ikki til.

### Gamalt hugskot

Hetta at savna sangarar í KFUM og K kórum síðani 1960 er eitt gamalt hugskot, sum Jóhanna Johannesen er mamma at.

– Hon er primus motor, sigur Tummas Pauli. Síðani eru hann og Pól Johannesen komnir við í fyrireikingararbeiðið, og saman fingu tey trý hetta tiltakið upp á beinini til gamans og hugna fyri mong.

– Í botn og grund verður slíkt tiltak gjørt fyri at náa menniskjum, sigur Tummas Pauli Mýri, og tað heldur hann avgjørt eydnaðist teimum hendan leygardag, tí tað vóru so mong, sum komu aðrastaðnis frá til hetta tiltakið.

375 innbjóðingar vórðu sendar út, og harav komu gott 200 fólk.

### Hugni

Hóast skráin fyri degnum var hørð, kórið skuldi jú læra níggju sangir, so var eisini rúm fyri hugna og práti. Hetta sigur Tummas Pauli var sera týdningamikið, tí talan var jú um fólk, sum kanska ikki høvdu hitst longi.

Og eftir konsertina var ein hugnaløta við kaffi, te og onkrum góðum afturvið í KFUM og K. Har vórðu eisini gamlar myndir sýndar fram, og fólk nýttu høvi at siga frá góðum og stuttligum søgum ella hendingum, sum tey høvdu verið út fyri. Onkur vitnaði eisini, og alt í alt var hendan løtan í KFUM og K sera hugnalig. Og konsertin eydnaðist jú eisini væl, so luttakararnir høvdu alla orsøk til at vera glað og nøgd.

### Ikki hvørt ár

Spurdur um hetta verður nakað, sum tey fara at fyriskipa sum eitt afturvendandi tiltak, sigur Tummas Pauli, at tað ikki er óhugsandi. Men hann heldur ikki, at tað so verður á hvørjum ári.

– Eg trúgvi ikki, at undirtøkan hevði verið líka góð, um tiltakið er á hvørjum ári, so kanska fimta hvørt ár. Ongin veit, sigur hann.

Konsertin varð bandað av Alvini E. Andersen og tikin upp á video av Ólavi Wolles, og er ætlanin hjá fyrireikarunum at fáa ein minnis dvd og fløgu gjørda - serliga til luttakararnar.



*Fyrireikararnir av tiltakinum, Tummas Pauli Mýri, Jóhanna Johannesen og Pól Johannesen, vóru sera vælnøgd við konsertina*

*Mynd: Bárður Lydersen*



*Eftir konsertina var hugnaløta í KFUM og K, har fólk sóu myndir og hoyrdu søgur*

*Mynd: Bárður Lydersen*